Hin evnaveiki og samfelagið

Um hetta evnið skrivar Jógvan Petersen, umsorgarnæmingur í Javna nr. 2, sum kom út herfyri:

Í einum og hvørjum samfelag er ein partur av fólkinum evnaveikur. Vanliga verður hildið, at upp ímóti 3% kunnu verða roknað millum teirra, ið hava ein lægri intelligens, meðan líka so nógv verða hildin at liggja við einum óvanliga høgum intelligensi.

Íntelligensur verður nógv ávirkaður av tí miljø, ein veksur upp í, í negativan eins væl og í positivan rætning, og tí er tað altavgerandi fyri tann evnaveika at liva og vaksa upp í einum stimulerandi miljø, har livi- og menningarlíkindini eru tey bestu.

Hvar er so hetta miljø at finna? — Jú, í tí vanliga bygda- og býmiljønum, har tey evnaveiku kunnu búgva, trívast og mennast og kunnu fáa sær fyrimyndir millum sokallað vanlig fólk, hvørs sið- um tey kunnu taka eftir. Uttan at so verður, fáa vit ein part av medborgarum okkara sum nakrar løgnar skapningar, ið vóru evnaveikir, og afturat at vera evnaveikir nú eisini blíva miljøskaddir, ið einki er at undrast á, tá ið hugsað verður um, at øll evnaveik verða savnað saman á einum lítlum øki, har tey lítla og onga ávirkan fáa uttanífrá, men samstundis verða stór krøv stillað til tey um at vera so og so, tá ið tey eru ímillum fólk við vanligum atburði.

Hesin parturin av medborgarum okkara er minni mentur at tosa søk sína og er vitandi um støðu sína í samfelagnum, og sjáldan munnu tey evnaveiku verða spurd um, hvussu tey kundu hugsað sær tilveru sína.

Hvønn rætt hevur tá hin evnaveiki í samfelagnum? — Jú, hann má taka til takkar við tí, ið honum verður boðið, sum má sigast at vera harmuligt, tí øll eru vit sprottin úr og borgarar í sama samfelag.

Tá ið talan er um evnaveik, verður oftast mest hugsað um djúpt evnaveik, men tey eru bert nøkur fá. Hesi hava rætt til eina tilveru, ið meining er í og á so humanum grundarlagi, sum samfelagið er født fyri.

Størsti partur av evnaveiku okkara liggur við eitt sindur lægri intelligensi enn fólk flest, og hesi eru tey, ið hava verið og enn verða meinast rakt, tá ið talan er um forsorg. Tey standa í eini marginalpositión. Tey kunnu nokk illa klára seg í effektiviteti í produktiónssamfelagnum, men ivi skal eingin vera um, at tey ikki kunnu gera valaverk, og tí má tað vera óneyðugt at reklamera við, at hetta er verk teirra evnaveiku.

Tann evnaveiki kann gera vána- og valaverk eins og fólk flest.

Nú hava vit her á landi verið í tí støðu, at vit frá almennari síðu lítið og einki hava havt at bjóða okkara evnaveiku her heima; men nú tykist vend at vera komin í, við tað at nú eru deildir á Statshospitalinum, har 30 fólk kunnu búgva. Hetta má sigast at vera eitt gleðiligt tiltak. Hesi fólk, sum hava verið í útlegd í mong ár, hava nú fingið loyvi at koma heim aftur til tað land, ið teimum so innarliga hevur longst til.

Tað kann ikki sigast annað, enn at lagnan var teimum hørð, tá ið einasta tilboð teirra var at verða send av landinum, rivin upp úr ti miljø, har tey vóru uppvaksin ímillum næstrafólk og kenningar og fara í eitt fremmant land við fremmandum máli, við siðum og ósiðum, ið tey lítið skiltu av.

Men tey komu til góð fólk, sum høvdu áhuga fyri og hegni at taka sær av teimum, og av somu orsøk fingu mong av teimum góðar dagar og hava tað framvegis gott, men ikki er komið á mál, fyrr enn vit hava øll okkara heima aftur.

Men nú tekur spurningurin seg upp: hvat vilja vit bjóða teimum, ið koma, teimum, ið eru komin og teimum, ið ongantíð fóru heiman.

Skal framtíðin vera at hava eina centraliseraða forsorg í Havnini?

Tað er nakað, ið talar fyri, at tað kundi verið ein góð loysn, tá ið hugsað verður um tað figgjarliga: felags køk, varkarí og annað, sum kanska kundi gjørt tað bíligari í fyrstu syftu; men hyggja vit frameftir, so man lítið vera spart.

Eg dugi ikki at síggja annað, enn at vit fáa nøkur hjálparleys fólk, ið vaksa upp undir hesum viðurskiftum, har alt verður gjørt fyri tey. Maturin kemur væl tilgjørdur heitur ella kaldur úr einum vogni úr rustfríum stáli. Tað má blíva ein stórur spurningur fyri hin evnaveika, hvat er matur, og hvaðani kemur hann frá. Tað er ikki lætt at skilja hjá einum, ið t.d. aldri hevur sæð eitt epli tikið úr jørðini, men bert hevur sæð tað kókað og flust liggjandi á einum fati liðugt at eta. Og soleiðis kunnu hundrað ymisk ting upproknast, sum tann evnaveiki kundi verið við til at framleitt. Vildi støðan ikki verið øðrvísi, um so varð fyriskipað?

Eitt annað, ið eg vil nevna her, eru klæðir. Klæðini koma í stórum mongdum á rullandi borðum, og tá ið skift er, fara tey avstað aftur sama vegin, uttan at hin evnaveiki veit, hvar tey fara, og hvat verður gjørt við tey. Vildi tað ikki verið meira rímiligt at verið við at gjørt arbeiðið og livað eitt lív so nær tí vanliga sum gjørligt.

Annað, ið talar ímóti centralisering, er, hvussu nógvum evnaveikum kann Havnin taka ímóti. Er hon før fyri at hýsa øllum okkara, ið hava okkurt handicap, og kunna acceptera tey líka so væl, sum í dag verður gjørt?

Hvat vilja vit bjóða teimum at takast við? — Her verður nokk fyrst og fremst hugsað um verkstøð; men vit eru øll ymisk av lyndi, og tí stendur ikki hugurin hjá øllum til tað arbeiðið. Um so ein búði á bygd, hvørjir møguleikar vóru at troytt har? Men eg hugsi ikki, eg skal geva hesum meira umtalu her.

Eitt annað, eg vil taka upp her, og sum eisini talar ímóti eini centralisering, er, hvussu nógva kontakt fær hin einstaki við tað sokallaða vanliga samfelagið, tá ið hann býr á einum ávísum øki bert saman við líkastillaðum? Hann fer í skúla, men hvørjum gongur hann saman við? — Jú, teimum sum búgva á somu deild. Hvussu stór verður tá stimulatiónin uttanífrá? — Undir hesum viðurskiftum veksur tann evnaveiki upp.

Tá hann so er blivin vaksin, hvussu er støðan tá? — Jú, hann kemur á aðra deild og fær tilboðið at koma á verkstøð. Men hvørjir eru arbeiðsfelagar hansara? — Jú, tey ið hann býr saman við. Hvussu er so við ávirkanini uttanífrá?

Tá ið nú sociala umsitingin kemur á føroyskar hendur um ikki so langa tíð, kundi eg hugsað mær at nomið við, hvat eg haldi vera framtíðar forsorg.

Í framtíðini má samfelagið kunna geva tilboð um forsorg úti um landið, har hjálp er tiltrongd. Her verður fyrst og fremst hugsað um tað evnaveika barnið. Teimum foreldrum, ið hava ta gleði at eiga hetta barnið, má samfelagið geva møguleika at hava barnið heima við at løna teimum fyri tað eykarbeiði, sum kann standast av einum handicappi. Harnæst mugu vera avlastingsheim og dagrøktarheim, har barnið altíð skal vera vælkomið. Út frá hesum heimum skulu serkøn fólk fara við leiðbeining og stuðli, sum tiltrongt er. Við hesi fólk kunnu so foreldrini samráðast um, hvat man vera best fyri barnið og framtíð tess.

Tá ið eg leggi so stóran dent á, at barnið má hava møguleika fyri at vera heima, er tað tí, at í dag er eingin í iva um tann stóra týdning, eitt gott heim hevur fyri barnið. Har kann tað fáa allan tann kærleika og alt tað, eitt barn treingir til í teimum fyrstu árunum, sum er tað fundamentala fyri framtíðina hjá øllum, og ikki minst tá ið talan er um ein, sum gjørdist evnaveikur. Hann kanska meira enn nakar annar treingir til eitt gott heim, meðan tann professionelli pedagogurin kemur í aðru rød. Hann er ein góður stuðul, har umstøðurnar ikki eru til staðar at vera heima hjá barninum. Tá má samfelagið kunna bjóða barninum at koma á eitt lítið heim við fáum børnum og ikki langt frá heimstaðnum, so at foreldrini kunnu kontakta barnið dag og dagliga. Her skal barnið kenna: hetta er mítt heim, og her veit eg, at eg kann vera, til eg verði vaksin.

Tá barnið er við at bliva vaksið og er komið til tann aldur, tá vanligt er at fara heimanífrá hjá ungfólki, má tað vera samfelagsins uppgáva at kunna bjóða teimum á heim, ið eru egnað til teirra, so nær tí vanliga sum gjørligt og við nøkrum fáum íbúgvum.

Plaseringin av hesum heimum má vera á bygd og í Havn í ymiskum býarpørtum, tí at hesi fólk kunnu og skulu ganga inn í samfelagið sum ein natúrligur partur av tí.

Ígjøgnum øldir hevur tann evnaveiki verið diskrimineraður, tá ið talan hevur verið um giftarmál, tí tann evnaveiki má ikki koma saman við einum mótsettum kyni. Er tað hent, er ofta stór gøla staðist av hesum, og tað almenna hevur gripið ínn og roynt at fáa hetta aftur í rættlag, uttan at hugsað hevur verið um, at ein, ið er evnaveikur, hevur somu tráan eftir tí mótsetta kyninum, sum sokallað vanlig fólk hava.

Og tí má serliga setast inn her. Um so skuldi verið, at ein, ið er undir forsorg, finnur saman við einum av mótsettum kyni, mugu tey hava sama rætt sum onnur at kunna setast í búgv.

Tá vóru vit komin langt í forsorg.

Kajbygging á vestursíðuni í næstu framtíð

framhald frá 3. síðu

setur eitt betri hóskandi far í rutuna Klaksvík — Lorvík um ikki so leingi.

Hendan bygging byrjaði á sumri 1972 og hevur kostað 3,8 mill. kr., og hevur arbeiðið gingið sum ætlað.

Eg vil siga tøkk til Føroya Løgting — Føroya Landsstýri og Ríkismyndugleikar fyri studningar. — Føroya Sparikassa — Føroya Lívstrygging fyri lánveiting til kommununar part av hesi bygging, og Føroya Banka, sum hevur figgjað hesa bygging.

Síðani vil eg takka Mikkjal Helmsdal, landsverkfrøðingi, sum hevur havt sjálvt projektið í hondum. Landsbyggifelagið, sum hevur gjørt projektið og havt tilsýn. Her megu nevnast Kristian Jensen og Kristian Rasmussen.

Eisini vil eg takka byggifelagnum *Kanjon* v/Johannes og Kjartan Hansen og arbeiðsformanni teirra Oliver Olsen og øllum arbeiðarunum fyri gott samarbeiði, og vil eg ynskja Johannes og Kjartan tillukku við hesi teirra fyrstu kajbygging.

— — —

Eg skal takka øllum, sum eru komin her og hornorkestrinum, sum setir sín festliga dám á. — Síðani skal eg bjóða teimum innbodnu gestunum at koma yvir í klubban, har tað er borðreitt.

Býráðsins vegna skal eg enda við at lata hesa bryggju til havnarnevnd og havnarmeistara at stjórna.

sosialurin

– blað við meiningum

STATENS PRÆMIEOBLIGATIONSLÅN 1965/75

Grå obligationer med serienumre 1—1000 og løbenumre 3001—4000 incl.

18. trækning 30. maj 1974

Følgende større præmier er i dag udtrukket

	serie nr.	løbe nr.	serie nr.	løbe nr.	serie nr.	løbe nr.	serie nr.	løbe nr.	serie nr.	løbe nr.	serie nr.	løbe nr.
400.000 kr.	793	3587										
200.000 kr.	964	3437										
100.000 kr.	590	3607	998	3082								
50.000 kr.	187	3490	329	3887	863	3292						
25.000 kr.	162	3619	538	3829	820	3258	923	3362				
	241	3761	616	3016	835	3503	980	3669				
10.000 kr.	96	3925	454	3988	488	3393	593	3543	618	3899	730	3299
	143	3332	460	3241	497	3151	595	3447	678	3655	774	3477
	345	3397	462	3851	502	3133	599	3250	698	3877	807	3043
	368	3065	473	3649	570	3249	611	3521	699	3475	902	3897
	399	3894										
5.000 kr.	55	3995	146	3833	329	3532	457	3217	686	3281	807	3080
	75	3581	158	3927	329	3536	499	3832	689	3295	814	3874
serie nr. / løbe nr.	87	3862	171	3346	338	3341	506	3744	712	3408	335	3499
	97	3101	177	3519	345	3590	553	3309	725	3564	837	3353
11 3376	99	3137	185	3633	375	3871	568	3091	758	3100	881	3774
14 3966	101	3157	212	3682	380	3617	570	3455	767	3647	928	3731
17 3984	118	3147	272	3950	389	3912	507	3630	768	3785	939	3206
19 3357	118	3412	275	3438	427	3701	588	3931	773	3396	966	3123
49 3494	129	3475	317	3992	445	3408	666	3548	801	3249	967	3302
55 3374												

Den officielle trækningsliste med samtlige 6900 præmier, samt numrene på endnu ikke hævede præmier fra de seneste fem trækninger, kan købes for 35 øre i bladudsalgene fra den 11. juni d. å. Trækningslisten vil ligge til eftersyn på alle posthuse. **Præmieudbetalingen finder sted i Danmarks Nationalbank og visse posthuse fra den 12. juni d. å.** Af kontrolhensyn vil der for præmier på 5000 kr. eller større beløb hengå nogle dage mellem obligationens indlevering og præmiens udbetaling. Præmier, der er faldet i denne trækning skal være hævet senest den 12. juni 1977. Efter denne dato er de forældede.

Finansministeriet